## Kærunevnd mannað

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum, hevur nú valt kærunevndina í lendismálum. Í nevndini eru Marjun Magnussen, løgfrøðingur, formaður, Jens Wang, løgfrøðingur, Birgit Hansen, verkfrøðingur, Óla Jákup Guttesen, byggimeistari og Petur Nielsen, útskiftingarkandidatur. Kærunevndin í lendismálum skal viðgera allar kærur eftir býarskipanarlógini, tinglýsingarlógini, matrikullógini og lógini um ognartøku.

## Ongan praktiskan týdning

Tað fær ongan praktiskan týdning fyri føroysk fiskiskip, at føroyingar og íslendingar eru vorðnir samdir um markið landanna millum. Í meiri enn 30 ár hava londini verið ósamd um tvær leiðir við markið, men í síðstu viku samdust partarnir um tað endaliga markið. Jákup Sólstein, formaður í Reiðarafelagnum, sigur við Útvarpið, at semjan fær ongan praktiskan týdning, tí síðani 2002 hava skip ótarnað kunnað fiskað í gráu leiðunum.

# Kvívíkingar fingið nýtt bingjupláss

**- Nei, nú skal pappírið og húsarhaldsruskið í hvør sína bingju. Tað skal ikki blandast saman longur!**

RUSK

*Snorri Brend*
snorri@sosialurin.fo

**Kvívík:** Leygardagin var serstakur dagur í Kvívík, tá nýggja bingjuplássið varð tikið í nýtslu.

Hetta hendi við eina samkomu á plássinum tey nevna Norði á Brúnum seinasta leygardag.

Nýggja bingjuplássið verður opið tríggjar dagar um vikuna – mánadag og mikudag frá kl. 17 til 19, og leygardag frá kl. 14 til 17.

Nú fáa kvívíkingar møguleika at skilja ruskið frá húsarhaldinum í trý ymisk støð: Pappírið skal í eina bingju, ruskið frá húsarhaldunum skal í eina aðra, og jarn og tílíkt í eina triðju.

Í sambandi við upplatingina av hesum nýggja bingjuplássinum eru tey gomlu bingjuplássini í Kvívík og í Leynum løgd niður.

- Kostnaðurin fyri plássið til móttøkuna er íalt 1,2 mió kr. Peningurin verður goldin yvir raksturin, sigur Boje Christensen, borgarstjóri í Kvívík.




*Fyrsti kundin við bingjuplássið er komin við ruski – Bjarni Dam og Árni Madsen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Nýggja bingjuplássið Norði á Brúnum er nú tikið í nýtslu*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Tríggir ábyrgdarmenn hjá kommununi í samband við nýggja bingjuplássið í Kvívík – vinstrumegin: Bjarni Dam hvør starvsøki er at ansa eftir bingjuplássinum; í miðjuni: Regin Djurhuus arbeiðsformaður hjá kommununi og uttast høgrumegin: Boje Christensen, borgarstjóri í Kvívíkar kommunu*

*Mynd: Jens Kr. Vang*